# Sameindar ella stríðandi tjóðir?

**"Um páfuglurin dansaði í jungluni, hvør sá hann tá?" segði Asma Jahangir nýliga á tíðindafundi - hon gramdi seg um lítla áhugan fyri mannarættindaarbeiðnum hjá ST. Men manglandi umtalu kann sonevnda "Durban II" avgjørt ikki leggjast undir – sera nógv rok hevur verið um ráðstevnuna, ið er vorðin skýrd alt frá "bleytt jihad" til part av "zionistiskari samansvørjing"**



*Billa Sondum er í ferð við at skriva serritgerð í religiónsfrøði á Københavns Universiteti, har hon skrivar um nógv umrøddu ST-ráðstevnuna »Durban Review Conference«. Hon dekkaði eisini hesa ráðstevnu fyri Sosialin.*

Navnframa ráðstevnan, ið júst er vorðin hildin í Genève, er framhaldið av "World Conference against Racism, Racial Discrimination, Xenophobia and Related Intolerance", ið varð hildin í Durban í 2001. Tað var triðja antirasismuráðstevnan hjá ST. Liðug beint áðrenn álopini 9/11, endaði hon sambært nógvum av luttakarunum sera jaligt, við einari vón um at fáa bilbukt við rasismu. Tó lótu ikki øll væl at; USA og Ísrael fóru sum mótmæli móti ákoyringunum móti Ísrael, ið sum tað einasta landið bleiv tikið fram sum rasistiskt.

"Durban Review Conference", eisini nevnd "Durban II", skuldi kanna, hvat er gjørt móti rasismu síðan 2001. Men ráðstevnan kom skjótt at snúgva seg um annað enn rasismu – spurnartekin vórðu sett við ST, og nógv lond í vesturheiminum hóttu við als ikki at taka lut. Fyrivarnið hjá teimum snúði seg um tvey mál: Ísrael og talufrælsi. Londini tosaðu beinleiðis um "reyðar linjur", ið ikki mátti farast tvørtur um, kanska sum mótsvar móti "reyðu linjunum" hjá muslimskum londum við felagsskapinum OIC á odda. OIC hevur leingi arbeitt fyri at banna tí, felagsskapurin rópar "ærumeiðing av religión". Hugtakið hevur verið til í ST-høpi í eini 10 ár, men hevur vunnið støðugt meira fram seinastu árini, t.d. aftan á donsku Muhammedtekningarnar. Men hugtakið ærumeiðing av religión snarar mannarættindunum, siga kritikkarar, so tey í staðin fyri at verja einstaklingar, verja tankar. Sostatt kann ST gerast júst ein sovorðið totalitert vald, ið felagsskapurin aftan á 2. veraldarbardaga varð settur á stovn ímóti.

## Bleytt jihad?

Orðini hjá kanadiumanninum Ezra Levant um "bleytt jihad" lýsa óttan í nógvum vesturlendskum londum undan ráðstevnuni – "um ein herur kom til strendur okkara og bað okkum strika javnrættindi hjá konufólki og talufrælsi, høvdu vit vart okkum sjálvi. Men tá sakførarar og lobbyistar koma, verða vit ørkymlað".

Longu teksturin frá "World Conference against Racism, Racial Discrimination, Xenophobia and Related Intolerance" í 2001 bleiv hildin at vera kontroversjellur, og fyrireikingarnar til "Durban Review Conference" vórðu sum sagt merktar av øsing og stríði. Kanada boykottaði beinanvegin ráðstevnuna, eins og Ísrael. Ein arbeiðsbólkur undir ST við Libya á odda fyrireikaði tekstin, ið skuldi mynda endaúrslitið av ráðstevnuni. Fyrsta uppkastið kom í januar, fult í formuleringum, ið buðu vesturlendskum londum ímóti – t.d. varð heitt á limalondini um at "steðga negativum stereotypum av religiósum persónum, bókum, skriftum og súmbolum" og beinleiðis at "avmarka talufrælsi við lóg."

Nú hóttu ES-londini (ósamd innanhýsis) við eisini at boykotta, eins og USA tók seg úr fyrireikingararbeiðnum. Síðani vórðu nýggj uppkøst gjørd; tað seinasta var eftir harðar samráðingar klárt vikuskiftið áðrenn ráðstevnan skuldi byrja. Í tí uppkastinum, nógv stytt, varð hvørki sipað til Ísrael ella ærumeiðing av religión – teksturin tók tó, sum framhald av "World Conference against Racism, Racial Discrimination, Xenophobia and Related Intolerance", undir við yvirlýsingini frá 2001.

Hóast semja var um nýggjasta uppkastið, var til tað allarsíðsta ivi um luttøkuna hjá fleiri londum. Endin var, at USA, Italia, Ný Sæland, Týskland, Eysturríki, Niðurlond og Pólland, umframt Kanada og Ísrael, vóru verandi við hús. Fyriskipararnir av ráðstevnuni vóru vónsviknir, og søgdu seg ongar ordiligar forkláringar hava fingið. Rósti Yuri Boychenko, ið hevði leitt seinastu samráðingarnar fyri ráðstevnuna, helt boykottini snúgva seg um nakað annað enn sjálvan tekstin, og tey boykottandi londini fingu nógv prik á ráðstevnuni, samstundis sum tað í heilum varð heitt á tey at koma við aftur.

Ráðstevnan vardi í fimm dagar, og har gekk - umframt arbeiðið fram móti einum endaligum teksti - mangt og hvat fyri seg. T.d. var ein demonstrasjón fyri Ísrael, ein onnur fyri Palestina, ein triðja fyri tamilsku tikararnar; har var minningarhald fyri Holocaust, offur fyri rasismu fortaldu um uplivingar sínar, NGO'arar skipaðu fyri pallborðsfundum. Men fram um alt var "Durban Review Conference" ein endalays røð av røðum.

## Vesturheimurin verstu rasistarnir

Iranskur presidentur og enfant terrible var Mahmoud Ahmadinejad fyrstur á røðarapallinum. Kendur fyri kontroversjellar útsagnir, kann tað tykjast løgið, at ST loyvdi Ahmadinejad fyrst fram at á viðbreknu ráðstevnuni, men tað var tí, at hann sum stjórnarleiðari hevði hægst status. Hann tosaði leingi, og tey, ið væntaðu øsing, vórðu ikki vónsvikin.

Sum vant setti hann spurnartekin við "ivasama" Holocaust, ið varð nýtt sum "undanførsla at seta á stovn heimsins mest rasistiska stat, Ísrael". Hann tosaði um "fólkadráp" á palestinensar, og fanst eisini hvassliga at ST, ið "krevur, at onnur lúka krøv, samstundis sum felagsskapurin sjálvur er ódemokratiskur" - vísti serliga til trygdarráðið og vetorættin har. Vesturheimurin er eisini upprunin til búskaparkreppuna, men leggur einki í avleiðingarnar fyri restina av heiminum. Ahmadinejad segði seg "hoyra rivurnar í súlunum undir heimskúgan; politiskar og búskaparligar skipanir vóru við at fara í skelk", og hann mælti til at venda kósini, venda aftur til andalig virðir. Atlit mugu takast til Gud og plássið hjá menniskjanum í skaparaverkinum, um man ætlar sær at skipa heimsviðurskifti í felag.

Ahmadinejad byrjaði røðuna við eini bøn, har hann m.a. bað um frið. Varð avbrotin av mótmælum – ung fólk í fívlaparúkki og reyðari nøs róptu "rasist!", og onkur teirra blakaði reyða nøs eftir honum. Mótmælararnir vóru fransk-jødiskir studentar frá NGO-felagsskapinum "L'Union des Etudiants Juifs de France". Men eisini umboðini hjá ES-londunum reistust og fóru út sum mótmæli - her vóru fleiri "reyðar linjur". Tjekkia, ið hevur ES-formansskapin, fór heilt av ráðstevnuni (eftir tað tosaði Svøríki sum umboð hjá ES).

Á tíðindafundinum aftan á endurtók Ahmadinejad atfinningarnar móti vesturheiminum (ið helst vendu sær móti áhoyrarunum heima í Iran, har val skjótt verður) – hví boykottaðu summi lond? Stuðlaðu tey kanska rasismu? Og ST sum súmbolið upp á demokrati og talufrælsi átti ikki at verið intolerant og ikki lurta eftir røðum hjá øðrum! Sjálvur hevði Ahmadinejad lurtað eftir Obama! Vesturheimurin var "arrogantur og sjálvupptikin". Presidenturin nevndi eisini, at tað vóru fá, ið vóru farin úr salinum – fá, men kortini vilja hesi kroysta virðir síni oman yvir heimin. ST er ein av hættunum, og eisini NATO, ið er ein undanførsla fyri at blanda seg uppí. NATO er "ekstremisma", og allur harðskapur í arabiska heiminum er orsakað av ávirkanini uttanifrá.

Tey flestu tóku beinanvegin frástøðu frá røðu Ahmadinejads. Uttanríkisráðharrin hjá Noregi, Jonas Gahr Støre, var á skránni beint aftaná, og hann talaði greitt móti Ahmadinejad – segði iranska presidentin hava nýtt talufrælsið, ið hann hevði allan rætt til, men at hann við úttalilsum sínum hevði gjørt júst tað, ráðstevnan vildi berjast ímóti: at eggja til hatur, ótta og intoleransu. Ahmadinejad hevði "hertikið felags royndirnar hjá so mongum" um semju. Eisini fyrireikararnir av ráðstevnuni, við Navi Pillay á odda, mæltu í tíðindabrøvum til ikki at geva sær far um Ahmadinejad, ið tey søgdu royna at spreiða polarisering og spilla ráðstevnuna. Tó kom óhepna byrjanin á at merkja restina av ráðstevnuni.

## OIC

Ekmeleddin İhsanoİlu, aðalskrivarin hjá OIC, var í røðu síni als ikki eins hvassorðaður og iranski presidenturin. Hann legði dent á, hvussu væl OIC hevði samstarvað um ráðstevnuna. Í OIC var var man serliga forharmaður um øktu islamofobiina síðan 9/11, og ikki minst í tí viðfanginum ærumeiðing av religión. Ærumeiðing av religión er nemliga moderna rasisma, ið elvir til meira islamofobi, við talufrælsi sum skálkaskjól, helt İhsanollu, hvørs felagsskapur annars "absolutt tekur undir við talufrælsi". Eisini egyptiski røðarin segði tað vera púra greitt, at rasisma, serliga móti muslimum, er økt seinastu árini. At halda løggávu móti eggjan til hatur muna móti ærumeiðing av religión, er eitt mistak. Somuleiðis mælti pakistanska umboðið til løggávu móti ærumeiðing av religión fyri at forða fyri islamofobi, grýluklæddum sum talufrælsi.

Á einum pallborðsfundi móti islamofobi undirstrikaði sendimaðurin hjá OIC, Babacar Ba, at islam einki hevur við terrorismu at gera, men at 9/11 tíverri verður nýtt sum undanførslu fyri at fáa fólk at halda tað. 9/11 er ein paraply til at leypa á muslimar og skapa spenning. Leiðarin í Islamic Human Rights Commission í London, Massoud Shadjareh, segði kanningar vísa, at 89% av bretskum muslimum kendu seg raktar av islamofobi. Talufrælsið – ið Babacar Ba og OIC taka undir við - verður misnýtt til at brennimerkja, "undirgrava" og stereotypisera muslimar. At ærumeiða religión brennierkir tey trúgvandi, og tey verða demoniserað. Sostatt er ærumeiðing av religión rasisma.

Michel Warschawski, jødiskur anti-zionistur, var enn meira víðfevnandi. Hann helt á sama pallborðsfundi fyri, at neokonservativar kreftir í vesturheiminum í nógv ár hava lagt ein globalan fígginda til rættis, sum propagandatól. Í byrjanini var fíggindin terrorisma, síðani islamistisk terrorisma og nú bara islam. Vesturheimurin noktar nemliga at geva skarvin yvir sum koloniharri í heiminum. Múrurin í Ísrael er sum enn ein Berlinmúrur – ímyndar av nýggjum sundurbýtið millum "siviliserað" og "barbarar". Múrurin er ein liður í at rekolonisera heimin, ið annars er støðugt meira avkoloniseraður síðstu 50 árini. Nógv umrøddu "reyðu linjurnar" eru luksus hjá arroganta vesturheiminum, ið við teimum bæði boykottar og avger skránna á ráðstevnuni.

Ákærurnar hjá Warschawski móti vesturheiminum bera brá av konspirasjónsteori, og kanska ekkóa - speglvent - óttanum hjá Levant fyri "bleytum jihad".

Tað kann tó tykjast ironiskt at leggja muslimsku londini undir fjaldar dagsskráir, tá tað er júst tað, nógv teirra ákæra vesturheimin fyri. T.d. rópti Ahmadinejad í røðu síni hersetingina av Irak eina undanførslu fyri at ræna olju og stuðla vesturlendskum vápnaframleiðarum.

Sum heild løgdu allir partar hvønn annan undir lótir, skálkaskjól og undanførslur.

## Burturbrøgd

Danski granskarin Lars Erslev Andersen hevur rópt donsku Muhammedtekningarnar eitt burturbragd, og eina einfalda metafor fyri stríðið um virðir í Miðeystri. Tekningarnar vóru muslimum ein einføld ímynd uppá, hvussu vesturheimurin onga virðing hevur fyri islam, at vesturheimurin einans ynskir at spjaða sínar sekuleru tankar, at stríðið fyri talufrælsi er eitt stríð fyri rættinum at berjast móti